# Dómarayvirlit

Formuladeildin 07/10:

| | |
|---|---|
| EB/Streymur – VB/Sumba | Ransin Djurhuus |
| AB – HB | Rúni Gaardbo |
| GÍ – NSÍ | Páll Augustinussen |
| Skála – KÍ | Dagfinn Olsen |
| B71 – B36 | Jens Petur Brattalíð |

**1. deild 6/10:**

| | |
|---|---|
| HB – SÍ | Bárður Mortensen |
| FSV 04 – TB | Jan Skoradal |
| B36 – LÍF | Eugen Voda |
| KÍ – ÍF | Rói Jacobsen |
| NSÍ – B68 | Andrew Christiansen |

**2. deild:**

| | |
|---|---|
| Skála – B68 | Marner Olsen |
| EB/Streymur – FSV 04 | Alex Troleis |
| MB – KÍ | FSV 04 |
| GÍ – Fram | Jákup Baldvinson |

# Í Gøtu tosa tey um 1987

**Fyri 20 árum síðani legði NSÍ fót fyri GÍ, tá ið gøtumenn vóru uppaftur tættari FM heitinum, enn NSÍ nú er tað**

GÍ-NSÍ
*Jákup Mørk*

FM kandidatarnir í Runavík fara sunnudagin inn um Gøtueið. Sjálvandi verður heimafylgið stórt. Fótbóltsspenningurin í og kring NSÍ stendur til at bresta. Eftir heimasigurin á HB liggur vegurin meiri víðopin at vinna fyrsta FM heitið nakrantíð, enn hann áður hevur gjørt tað øll tey árini, sum NSÍ - síðani fyrstu stetlandi fetini í bestu deildini í 1976 – hevur roynt seg.

Besta kappingarárið higartil hevur verið 2002. Ta ferðina vunnu teir steypakappingina á Ólavsøku, og ta ferðina var NSÍ leingi væl við í kappingini um gullkrónurnar. Men ta ferðina snávaðu teir á heimavølli ímóti HB, og so eydnaðist tað í síðsta umfari at vinna silvurmerkini við 3-2 sigri í Klaksvík. Hesa ferð stóð NSÍ seg ímóti HB, og nú verður sjálvandi miðjað hægri enn eftir silvurkrónunum.

Hóast tað á støðutalvuni er stórur munur á oddaliðnum NSÍ og GÍ, so roknar eingin í Runavík við léttari uppgávu og avgreiðslusigri í Sarpugerði. Tað plagar at vera tætt og spennandi, tá ið hesi bæði grannaliðini takast, og soleiðis verður tað roknað við, at tað eisini fer at verða hesa ferð.

Í NSÍ kenna teir væl GÍ konseptið, men teir kvíga ikki fyri, at teir skulu liggja undir, tá ið gøtumenn fara at nýta kropsligu styrkina. Tað ræður um at spæla skjótt og harvið at sleppa undan nærdystum, og um talan verður um tættar støður, so er NSÍ væl fyri, hvat tí viðvíkur.

Eyðkent fyri oddaliðið hevur higartil í ár verið, at talan hevur verið um ógvuliga fáar skaðar, og fáu kortini hava borið so at siga eingi leikbann við sær.

## Fleiri hava haltað

Nú eru leikbannini og skaðarnir eisini komin til Runavíkar. Lyklaspælarin á miðvøllinum, Nenad Stankovic, var orsaka av skaða ikki við ímóti HB. Nenad hevur ikki vant í vikuni, og í morgun vóru vánirnar mettar lítlar fyri, at Nenad sunnudagin verður komin fyri seg. Tað er knæskaði, sum plágar.

Hesa ferð er ein av stóru stríðsmonnunum leikbannaður. Tað er Hjalgrím Elttør, sum síðstu lítlu løtuna sá gult tvær ferðir og harvið reytt ímóti HB.

Í vikuni bar góða NSÍ gongdin við sær, at ikki færri enn fimm NSÍ spælarar vórðu úttiknir til landsliðsavbjóðingarnar, sum standa fyri framman. Hetta talið av landsliðsspælarum hevur NSÍ ongantíð átt í nánd av. Umframt teir fimm er eisini Jens Martin Knudsen knýttur at landsliðnum sum málmansvenjari.

Ein av nýggju landsliðsspælarunum, liðformaðurin Óli Hansen, hevur orsaka av skaða verið burturi frá venjing fleiri ferðir í hesi vikuni. Eingin ivi er um, at hann fer at spæla í Gøtu, og tað fer Sjúrður Jacobsen, sum hevur verið skaðaplágaður, eisini at gera.

## 20 ára minni

Í Gøtu hava tey einki ímóti at minna á, at meðan ÍF, B68 og GÍ kunnu vísa á eitt og fleiri FM heiti, so eru teir í NSÍ, hvat meistaraheitum viðvíkur, púra sørir.

GÍ var fýra ferðir meistari í 90unum, og í 80unum vann GÍ tvær ferðir – í 1983 og í 1986. Árið eftir – í 1987 – komu FSF topparnir undan síðsta umfarinum til Runavíkar við FM steypinum, sum tað varð roknað við, at GÍ skuldi fáa handað. Men NSÍ snýtti gøtumenn og vann, og so fór riðilin við tyrlu suður á Sevmýri at handa TB steypið. Tað kendist sum ógvuliga stórt vónbrot fyri tey GÍ fylgið, sum nakkalangt fór inn aftur um Eiðið við rakettunum og sjampanjuni.

Nógvir av teimum, sum nú manna liðini hjá NSÍ og GÍ, minnast av góðum grundum einki til, hvussu tað gekk fyri seg fyri tjúgu árum síðani. Men millum áskoðararnar eru tað fleiri, sum komast við ta ferðina, og teir í GÍ fara ivaleyst at leggja eins nógv fyri, sum NSÍ gjørdi, tá ið GÍ var so tætt FM heitinum. Spurningurin er, um NSÍ sunnudagin fer at vísa gummibeinini, sum GÍ vísti fyri tjúgu árum síðani. Nógvu tær seinastu ferðirnar hevur einki bent á, at tað fer at verða soleiðis.

# Við – ikki við

Skaddur: Fróði Clementsen

Allir tøkir

Leikbann: Símin Hansen
Ivasamir: Clayton Soares

Skaddir: Gert Hansen (knæskaði) og Zsolt Szekeres (knæskaði)

Skaddur: Sámal Joensen (knæskaði)

# Niðurteljing á Argjum

**Hóast AB fyrr í summar á heimavølli hevur argað HB, so bendir alt á, at sunnudagurin fer at staðfesta niðurflytingina**

AB-HB
*Jákup Mørk*

Tað ber framvegis til at rokna seg fram til møguleikan, at AB skal varðveita plássið í bestu deildini. Men eingin – heldur ikki tey á Argjum – rokna nú við, at fyrsti steðgurin hjá AB í bestu deildini verður longri enn hetta eina árið.

Hóast úrtøkan ikki hevur verið nóg dygg til at halda fram í Formuladeildini, so hava tað verið góðar fótbóltslotur uttanfyri brúnna. Eitt nú í 8. umfari 6. mai, tá ið HB vitjaði, og úrslitið gjørdist 2-2.

Ta ferðina varð sagt, at teir á heimaliðnum vóru nógv meiri uppsettir, enn teir á meistaraliðnum vóru tað. Spurningurin er nú, hvussu tað verður við motivatiónini. AB hevur mist vónina um at sleppa undan niðurflytingini, og HB hevur eftir tvey tap á rað mist møguleikan at endurvinna FM heitið.

AB eigur at hava æruna at berjast fyri og tað, at tað altíð er hugaligt at arga tann stóra, og í HB eiga teir at hava bronsumerkini at stríðast fyri.

# Bronsan skyggir bjartari

**Eftir fullaúrtøku í tveimum torførum útidystum hevur EB/Streymur á heimavølli møguleika at styrkja um sína støðu í stríðnum um bronsukrónurnar**

EB/STREYMUR-VB/SUMBA
*Jákup Mørk*

Hjá báðum pørtum varð fyri nøkrum árum síðani mett, at tað tænti søkini best at leggja saman. Felagsliðið í Sundalagnum hevur síðani samanleggingina havt góða gongd. Fyrr í summar vunnu teir steypakappingina fyri fyrstu ferð, í fjør vunnu teir silvur í landskappingini, og sunnudagin hevur EB/Streymur góðan møguleika at styrkja um sína støðu í kappingini um bronsumerkini.

Uppgávan hjá EB/Streymi sær hesa ferð hópin léttari út, enn hon hevur gjørt tvær tær seinastu ferðirnar, tá ið EB/Streymur hevur fingið fult í Klaksvík og í Gundadali ímóti HB.

Samansetta Suðuroyarliðið er longu flutt niður. Tað kann gott vera, at gongdin undanfarnu árini hevði havt verið uppaftur lakari, um Vágur og Sumba ikki høvdu havt lagt saman. Nú verður í hvussu so er tosað um uppaftur fleiri samanleggingar í Suðuroy. Hetta verður mett at tæna fótbóltinum í oynni, sum næsta ár ikki verður umboðað í fremstu røð.